# Høgni Hoydal er unfair

JÓGVAN VIÐ KELDU
www.keldu.com



**Hóast eg hevði ynskt at sloppið undan hesum viðmerkingum, nú meiri enn ár er farið, síðani eg fór úr politikki, fari eg at rættleiða mín undanmann, eisini fyri søgunnar skuld**

Tey árini Høgni og eg sótu á tingi saman, høvdu vit fleiri hugnaligar samrøður. Onkuntíð segði eg við hann til stuttleika: »Tá ein persónur er klókur, er hann farligur, og er hann so afturat ein kúllur, er hann lívsfarligur«! – So flentu vit at tí.

Í Dimmalætting nr. 56 seinasta fríggjadag er samrøða við hann. Samrøðan snýr seg um útlendingamál og fyrispurning hann hevur sett landsstýriskvinnuni.

Her stendur m.a.: »Útlendingamálini hava verið ein fyrisitingarlig og rættarlig fløkja í mong ár – og serliga síðani 2004, tá táverandi landsstýrismaður og síðani táverandi landsstýrið vavdi alt upp í ein ellibita,« sigur altso Høgni Hoydal.

Í februar mánaði í 2004 arvaði eg sum landsstýrismaður útlendingmál eftir Høgna Hoydal. Fari tí at koma við onkrum viðmerkingum sum geva ávísar ábendingar.

**Rættarmál og vanlagnur**

Tá eg tók við, vóru ikki bara sera álvarslig mál at taka upp, men sannleikin er, at her vóru bæði rættarmál á fleiri mótum og djúpar vanlagnur, har útlendingar vórðu viðfarnir sum trælir. Bert eitt av mongum, vóru tiltiknu 17 tailendingarnir, sum uttan iva bók kundi verið skrivað um. Hevði eg ikki verið farin úr politikki, hevði eg kallað útle ndingamálsviðgerðirnar undan mær »eina suppu«!

Tað harmiliga er, at hetta veit Høgni Hoydal væl!

Vit minnast eisini ítróttamálini, sum tilvildarligir arbeiðsgevarar bara skrivaðu undir.

Eitt tað fyrsta, eg var noyddur at gera, var at umskipa eitt skrivstovuhøli í Innlendismálaráðnum – har frammanundan ikki var nógv pláss - til eina mestlíknandi »kriminalstovu«, har eg mátti seta starvsfólk til at greiða skeivt avgreidd útlendingamál, fløkjur og vanlagnur, sum arvaðar vóru frá undanmanni mínum.

Fútin tók m.a. til: »Fært tú ikki skil á hesum óskili, sleppi eg málunum fullkomiliga!«.

**Journalistar og »spennandi« líkasæla**

Høgni Hoydal er journalistur av útbúgving, og eftir at eg nú eina tíð havi verið uttan fyri politiska umhvørvið, havi eg stundum spurt meg sjálvan, »kann tað vera so galið, at hetta er orsøk til, at føroyski fjølmiðlaheimurin bara skoytaði yvir veruligu spurningunum, og sjálvandi eisini, at ítróttaáhugað lutvíst sótu á fjølmiðlunum«?

Innlendismálaráðið beyð fleiri ferðir øllum føroyskum fjølmiðlum at fáa fyrilestur um, at málið veruliga snúði seg um, ikki at viðgera lógir undir kensluligum avgerðum, men paragraffir, kaldar og greiðar paragraffir, sum skuldu umsitast rætt!

Ein blaðskrivari hjá Dimmalætting, Randi Jacobsen, setti seg inn í málið, og Helgi Jacobsen, journalistur, gjørdi eina líkinda útvarpssending. Restin, vil eg siga, vassaði í tómum heimi. Tað var møguliga meiri »gevandi« og meiri »spennandi" fyri tey, men vísti eina óhugnaliga líkasælu fyri hesum álvarsmáli!

**Politiski hugburðurin**

Politiski moralurin á tingi, har starvsfelagar í Innlendismálaráðnum vóru illa viðfarin, hetta er sjálvandi fest í dagbók, var veruliga simpul. Hesin hugburður ger helst eisini, at Føroyar ikki eru komnar longur. Ilt er at skilja, at ein lóg er ein lóg.

Onkur kendi onkran, sum kendi onkran annan. Onkur annar hevði hoyrt um onkran, tí nú skuldi hann aftur av landinum, og tað var ikki rætt! Soleiðis vóru viðgerðir!

Tá »lítla samgonga" legði á meg at viðgera mál ólógliga, fyri at »fáa frið", noktaði eg.

Annað var, at arbeiðsloysið øktist munandi í 2004/05, fór 2002/03 frá undir tveimum prosentum og upp um 4%. Tí var heldur ikki brúk fyri so nógvum útlendingum, uttan undir serligum umstøðum.

Tvinnir tættir skulu vit hava í huga. Tann fyrri, at hetta er donsk lóg, so leingi hon ikki er føroysk, sum skal fyrisitast sum so, hitt er, at ein útlendingalóg er gjørd fyri at verja okkara land og fyri at fáa fatur á fólki, tá vit hava brúk fyri tí.

**Ikki er komið longur**

Høgni Hoydal og eg hava verið og eru samdir um, at ein tílík lóg átti at verið føroysk og gjørd eftir føroyskum viðurskiftum, men hesum hevur tíverri ikki fingist meiriluti fyri á tingi. So leingi hon er tað, hon er, skal hon fyrisitast eftir núgaldandi reglum.

Men lat meg til seinast siga, at tað var gott, at tikið var so rívan til í útlendingamálum í 2004. Mongu málini vóru nóg álvarslig! Tað sum eg segði á tingi og í fjølmiðlum tá, var alt rætt. Kanska kundi eg av og á verið eitt vet diplomatiskari, helst so.

Hóast mær betri hevði dámt at sloppið undan hesum viðmerkingum, haldi eg best er, ikki minst fyri søgunnar skuld, at koma við hesum viðkomandi rættleiðingum til undanmann mín í útlendingamálum, Høgna Hoydal.

Sum fyrrverandi landsstýrismaður má eg ásanna, at friðarligari hevur verið á útlendingamálum seinastu árini. Harmiligt kortini, at ikki er komið víðari, eftir at eg av álvara tók málið upp.

Tað er tó hugstoytt, at Høgni er so unfair!

# »Vekingarmøti« í Skálavík

JOHAN SAMUELSEN



Tjóðveldi hevur havt flokstíng um vikiskiftið í Skálavík, og tað var ikki sørt við spenningi at fylgt varð við, hvat var at frætta haðani, nú so hart leikar á á fíggjar- og búskaparøkinum, og altjóða kreppan bert sýnist at standa við og versna. Vit øll somul, tað veri seg hin einstaki, vinnulívið, fíggjargeirin, politiska skipanin v.m. verða noydd at taka tung tøk komandi tíðina, sum koma at raka okkum øll, meir ella minni, og sum er hin nógv størsta einstaka hóttanin og avbjóðingin móti dagligdegnum og vælferðini hjá einstøku familjuni her á landi, nú avgerandi funktiónir í samfelagnum standa og ridla. At almennu Føroyar mugu út í heim at læna 500 mill. kr. til at fíggja undirskotið á løgtingsins fíggjarlóg, tað er ikki bara sum at siga tað, og eftir øllum sólarmerkjum at døma við minkandi MVG inntøkum hjá landinum og fallandi skatti hjá kommunum og landi, er ikki ringt at rokna út, at neyðugt verður enn einaferð at fara út at læna, og hvørjar verða treytirnar, sum altjóða bankar seta okkum? Sporini ræða...

Hvat er so svarið hjá Tjóðveldinum upp á hesa sera álvarsligu fíggjar- og búskaparstøðu, sum vit og heimurin allur júst eru í, og sum sjálvsagt er fremsta kjakevni á politiska vígvøllinum allastaðni, líkamikið um talan er um støðuna í stóra USA ella í lítla Íslandi? Jú, í Føroyum boðar sjálvur formaðurin hátíðarliga frá suðuri í Skálavík, at neyðugt er við, haldið tykkum fast, nýggjari tjóðskaparrørslu! Makan til politiskt neyðaregg skal man leingi leita eftir! Er hetta alt, sum Tjóðveldi, sum aðruhvørja løtu rópar seg at vera egnaðan sum stjórnarberandi flokkur, hevur at bjóða Føroya fólki í hesi løtu, har toskurin svíkur, virki lata aftur, og arbeiðsloysið veksur dag frá degi? Allur heimurin, allar fyritøkur sum royna at knógva undir hesum fíggjarliga ólógi, skríggja eftir kapitali, men standandi loysnin hjá Tjóðveldinum upp á allar búskaparspurningar er: minkið um blokkin, minkið um fíggjarmøguleikarnar, so eru allir knútar loystir – álvvaratos, fer allur heimurin skeivur, meðan Tjóðveldi hevur funnið ljósið suðuri í Skálavík?

Og so tekur Høgni Hoydal skálvíksingin og mentamannin Heðin Brú upp á tunguna, sum ein, ið hevur brotið burturúr nýggjum og brotið frá – jú, rætt er tað, Heðin Brú hevði nevniliga andstygd fyri turrgeldu nationalu tómgongdini aftur og fram á tingi eftir floksbýtið 1906 millum Sjálvstýrisflokkin og Sambandsflokkin, og júst tí tók hann undir við nýggju hugsjónini, sum Javnaðarflokkurin umboðaði, og sum setti einstaka menniskja og lívsmøguleikar tess í sentrum, og á fyrsta sinni setti fordeilingspolitikkin á skrá upp ímóti nationalu tøvingini á staðnum - og Høgni, ja hann stendur og tøvir enn!?

Eg skilji væl, at Tjóðveldi ikki verður tikið í fullum álvara á tingi, og at álitið á floksformannin er rokið! Onki boð upp á dagsins stóru trupulleikar, men týskarin Hegel, hann við tjóðskapinum, skal ordna trupulleikarnar hjá okkum føroyingum anno 2009 við eini nýggjari útgávu av nationalismuni, saman við ein miðvísari niðurlaðing av blokkinum, nú gassið og geistin er farið av gamla fullveldis- og loysingartosinum – tað er alt?! Eisini nevnir Høgni onnu r"stórmál", sum t.d. lásamálið, hvussu stóran týdning tað hevur fyri Føroyar, at Høgni sleppur at spæla "uttanríkisráðharri í egnum landi", at tjóðveldi ikki er tað sama sum "húðaskógvamentan", og so nevnir hann eisini tey 19 uppskotini, sum blivu løgd fram á tingi frá Tjóðveldi nú um dagarnar, sum fevna líka frá Búskapargrunni til at læra føroyskar journalistar at stava og lesa (hava hesir ikki gingið í skúla og lært føroyskt í ein 12 –13 ár!??) – alt kostnaðarmikil uppskot, men Tjóðveldi, teimum so líkt, ikki eitt orð um, hvør skal fíggja hesar fleirfaldaðu milliónupphæddir, av sonnum, nationalt svermarí fyri gallarínum! Hetta er ikki ein "misskilt nationalisma" – hetta er beinleiðis gráturligt, at hesin flokkur tekur hættisligu støðuna í landinum í so lítlum álvara. Væl veit eg, at akademiska havnarkjarnan við Høgna, Sjúrði, Bjørt, Bergtóru o.s.fr. hevur fult ræði á flokkinum, og hesi ferðast sjáldan í hugaheiminum uttan fyri ein radius uppá 5 km frá Vaglinum í Havn, men máti skal vera við!

Sum Shakespeare gamli segði á sinni: words, words, words....

# Mangt skal man hoyra

EYÐGUNN SAMUELSEN
býráðslimur



Eitt gamalt orðatak sigur nakað soleiðis: »mangt skal man hoyra innan av dettur oyra«. At lesa her í blaðnum, at Gunnvá við Keldu leggur eftir minnilutanum í býráðnum fyri at gera samtyktir á veikum fíggjarligum grundarlagi í samband við at samtykt varð at seta í verk systkinafrádrátt, er næstan láturligt.

Hon sjálv kann ikki sigast at hava verið við til at styrkt fíggjarliga grundarlagið hjá kommununi, heldur tvørturímóti. Fyri tað fyrsta, so noktaði hon at síggja fíggjarliga veruleikan hjá kommununi í eyguni, tá ið hon noktaði fyri at hækka skattaprosentið júst fyri at styrkja um fíggjarliga grundarlagið hjá kommununi. Um tað bara var av reinari populismu fyri at verða afturvald í býráðið, skal eg og lata verða ósagt.

Fyri tað næstað, so brigslaði hon býráðnum fyri ikki at hava fíggjarligt skil og at lata seg stýra av svartskygni. Tí vit ikki vildu seta inntøkuna í 2009 hægri enn útrokningarnar hjá fíggjarmálaráðnum vístu.

Hon vildi fegin hækka hetta talið við fleiri milliónum og harvið gera fíggjarliga grundarlagið hjá kommununi fleiri milliónir veikari, enn tað nú er. Hon vildi hava inntøkurnar upp á 129 milliónir við óbroyttum skattaprosenti. Hetta merkti samstundis, at hon vildi gera samtyktir, ið kostaðu fleiri milliónir meira enn býráðið gjørdi. Kann leggja aftrat, at hon vildi privatisera vaskingina, millum annað í kommunalu skúlunum, eisini skuldi Miðlan latast aftur.

Høvdu vit fylgt fíggjarliga skynseminum hjá sitandi borgarstjóra, so hevði undirskotið verið fleiri milliónir hægri enn tað er í dag.

**Beinharðar raðfestingar**

Vit valdu at taka ábyrgd, men tað hevði alt at siga fyri okkum, at tey ið hava minst fíggjarligt rásarúm, barnafamiljurnar, skuldu rakast minst. Tí samtyktu vit systkinaavslátturin, ið kostar 300 t.kr. Øll vita, at tað eru tey, ið hava minstu inntøkurnar, ið verða harðast rakt í kommunuskattinum. Tað er eisini púra burturvið at siga, at júst tær 300 t.kr til sytskinaavsláttur á fíggjarætlanini eru ikki til. Tí í veruleikanum er tað býráðið, ið avgerð, hvat av tí, ið samtykt er, pengar ikki eru til tá inntøkan svíkur.

Samgongan hevur, síðan hon tók við, uppraðfest teknisku deild við meira enn 300 t. kr. Hetta var ikki samtykt á fíggjarætlanini, men tað eru tað pengar til. Eisini hevur samgongan niðurraðfest sosialu deild við tveimum størvum, hetta var heldur ikki samtykt á fíggjarætlanini, hetta er ein sparing á meira enn 300 t.kr.

Niður við sosialu deild, upp við teknisku deild og ongan systkinaavsláttur, hetta eru raðfestingar, ið vilja nakað. Í so máta má man siga seg samdan við borgarstjóran, tá ið hon sigur í bløðunum, at tað skulu beinharðar raðfestingar til, og tað júst er tað, ið hon og samgongan gera í hesum døgum.

Tað er ein avbjóðing at stýra í tíðum sum hesum, men tað er júst í ringum tíðum, at tað sæst, hvørjar politiskar raðfestingar, ið ein samgonga ger. At henda samgongan hvørki raðfestir sosiala økið ella barnafamiljurnar, sær ein og hvør í hesum døgum.